# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 06.10.2016 kl. 16.00

Á fundi: Trúgvi Gudmundarson
Rúni Thomsen
Eyðfinn Debes
Martin í Nesi
Niels J. Thomsen
Jóhan Eli Poulsen

Ikki møtt: Magni Bertholdsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um stuðul við keyp av bókini Miðnámsrit.**
   Samtykt varð einmælt ikki at keypa bókina.

2. **Avtala við Landsverk um vetrarhald 2016 / 2017.**
   Avtalan fevnir um kavarudding og salting av umleið 750 m av vegi. Samtykt varð einmælt at taka undir við avtaluni.

3. **Skriv viðvíkjandi felags øki í Nesi.**
   Samtykt varð at siga frá, at Hvalbiar Bygdakassi (bygdanevnd) avvarðar málinum. Viðvíkjandi kloakkini, varð samtykt at siga frá, at málið verður kannað.

4. **Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 160c og 336b, Hvalba.**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

5. **Ummæli av keypi av uppískoytisstykki til matr. nr. 95f, Hvalba.**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini.

6. **Val av limi í Kommunuvalnevndina í Hvalba fyri Ingibjørg Vestergaard.**
   Samtykt varð at velja Sunrid Olsen sum fast umboð í nevndina. Sum eykaumboð varð samtykt at velja Poul Laust Christiansen, Poulu Thomsen og Halltóru Joensen. Í Kommunu-, løgtings- og fólkatingsvalnevndina í Sandvík varð samtykt at velja Andras Joensen og Sverra Jacobsen sum eykaumboð. Kommunuvalnevndirnar skipa seg sjálvar.

7. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd:**

- Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 336b, Hvalba.
- Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 181f, Hvalba.
- Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 87v, Hvalba.
- Tilboð uppá rennugravara av merkinum Tekeuchi TB 235/TB 240.

**Vega- og havnanevnd:**

- Skriv um ábøtur á skúrin á Hamranesi og kostnaðarmeting av hesum.

**Trivnaðarnevnd:**

- Skriv viðvíkjandi koyring til eldrafimleik.
- Skriv frá Hvalbiar skúlastýri viðvíkjandi skúlagarðinum og leikur til hann.

**Fíggjarnevnd:**

- Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Hvalbiar sóknar bygda- og kolasavni.
- Tilboð uppá rennugravara av merkinum Tekeuchi TB 235/TB 240.

8. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Martin í Nesi):**

- Byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 336b: Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til bilhús sambært umsókn, tekningum og givnum upplýsingum, treytað av, at eigaraviðurskiftini eru í lagi.
- Byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 181f: Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til bilhús sambært umsókn, tekningum og givnum upplýsingum.
- Byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 87v: Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til bilhús sambært umsókn, tekningum og givnum upplýsingum, treytað at, at Landsverk ikki hevur viðmerkingar til málið.
- Tilboð uppá rennugravara: Nevndin mælir bygdarráðnum til at taka av tilboðnum.

**Vega- og havnanevnd (framløga Eyðfinn Debes):**

- Skúrur á Hamranesi - kostnaðarmeting: Nevndin ynskir at kanna málið nærri til komandi fund.

**Trivnaðarnevnd (framløga Rúni Thomsen):**

- Skriv viðv. koyring til eldrafimleik: Nevndin mælir til at játta koyringina til eldrafimleik, kostnaðurin av hesum er kr. 400,- um vikuna. Samtykt varð at játta hesum fram til nýggjárs.

- Hvalbiar skúlastýri – skúlagarðurin: Nevndin mælir til at játta skúlastýrinum kr. 50.000,- til útvegan av leikum/útgerð til skúlagarðin. Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum frá nevndini og játta hesum í ár.

**Fíggjarnevnd:**

Jóhan Eli L. Poulsen luttók ikki í viðgerðini av komandi máli

- Stuðul til Hvalbiar sóknar bygda- og kolasavn: Samtykt varð at stuðla við kr. 20.000,- í ár.
- Tilboð uppá rennugravara: Nevndin mælir bygdarráðnum til at taka av tilboðnum uppá rennugravara av merkinum Takeuchi TB 235 á kr. 348.000,-. Samtykt varð at fylgja tilmælunum frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini og taka av tilboðnum.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30

Trúgvi Gudmundarson Rúni Thomsen Eyðfinn Debes

Martin í Nesi Niels Jacob Thomsen Jóhan Eli Poulsen